## Pætur verandi við Margáir

Pætur Dam Jacobsen og EB/Streymur hava skrivað undir nýggjan sáttmála, sum bindur partarnar saman eitt ár afturat. Pætur, sum áður hevur spælt við HB, AB og Skála, kom í ár til EB/Streym, og her hevur hann eftir øllum at døma trivist heilt væl. Pætur, sum hevur ein einstaka landsdyst á kotini, kann brúkast á flestu plássum á miðvøllinum, umframt at hann eisini í fleiri umførum hevur røkt bakkplássið í høgru.




## CL-bóltur í kvøld

Eftir at landsliðsfótbóltur var á skránni í farnu viku, verður Champions Leagu-fótbóltur nú aftur á skíggjanum. Í kvøld eru dystirnir hesir: Debrecen-Fiorentina, Liverpool-Lyon, Barcelona-Rubin Kazan, Inter-Dynamo Kiev, Rangers-Unirea Urziceni, Stuttgart-Sevilla, Alkmaar-Arsenal og Olympiakos-Standard Liege. Liverpool-Lyon verður sendur beinleiðis á 3+, meðan TV2sport sendir frá dystinum millum Barcelona og Rubin Kazan.

### KÍF-StÍF 26-34 (11-20):

# StÍF aftur oddalið

**Kollfirðingar taptu enn einaferð greitt, og so er lagt upp til oddabrak, tá StÍF og Neistin hittast**




Jákup Mørk

Higar til hevur KÍF ikki megnað at gjørt tað stóra við mótstøðuliðini, og tað gjørdu kollfirðingarnir heldur ikki í gjárkvøldið.

Longu í fyrra hálvleiki var tað mesta avgjørt, og so kundu strandingarnir hálvgum taka sær av løttum, áðrenn teir aftur løgdu leiðina norðureftir.

Kollfirðingar hava nú spælt fýra dystir, sum allir eru endaðir við greiðum tapi, og í løtuni er ilt at síggja, hvussu liðið skal klóra seg av sætta plássinum, sum væl kann bera beinleiðis niðurflyting við sær í ár.

Strandingar fótaðu sær hinvegin eftir avsmurningin, sum teir fingu móti VÍF seinast. Saman við Neistanum hava strandingar nú seks stig fyri fýra dystir.

Komandi sunnudag hittast júst hesi bæði liðini í Høllini á Skála, og tá verður talan um veruligan oddadyst.

Vit hava tíverri ikki fingið nøkur hagtøl frá dystinum.




Strandingar lótu ikki minsta ivan vera, tá teir í gjár vitjaðu hjá KÍF, sum nú er púrasta avbyrgt í botninum

Mynd: Álvur Haraldsen

**Hondbóltur**

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 116 | 102 | 14 | 6 |
| 2 | Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 125 | 113 | 12 | 6 |
| 3 | VÍF | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 122 | 114 | 8 | 4 |
| 4 | H71 | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 103 | 95 | 8 | 4 |
| 5 | Kyndil | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 110 | 114 | -4 | 4 |
| 6 | KÍF | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 87 | 125 | -38 | 0 |



Smádreingirnir hjá B36 hava í ár sýnt óvanliga styrki á vøllinum

# Einastu greipuvinnararnir

**Smádreingirnir hjá B36 syftu allari mótstøðu í árinum, sum fór**

Eingin ivi tykist vera um, at B36 í verandi smádreingjaárgangi hevur eitt gylt ættarlið av fótbóltsspælarum.

Í ár var liðið tað einasta í dreingjarøðunum, sum vann greipuna, og bara tað í sjálvum sær er sum vera man eitt úrslit, sum elvir til stoltleika í felagnum.

Og stoltleikin gjørdist neyvan minni av, at bæði B- og C-liðið eisini gjørdu um seg í árinum.

B-liðið vann sín økisbólk, meðan C-liðið vann kappingina á hálvum vølli, so alt í alt gjørdist talan um gull úr enda í annan hjá smádreingjunum.

Venjari hjá liðunum var í ár Milan Cimburovic, sum eisini er høvuðsvenjari fyri yngru deildirnar hjá B36.

**mørk**